Almanna- og heilsumálaráðið

# Løgfrøðingar

## Vit sóknast eftir 2 løgfrøðingum til Almanna- og heilsumálaráðið

Lógir og reglur á almanna- og heilsuøkinum eru altíð á breddanum, tí tær hava stóran og beinleiðis týdning fyri nógv fólk í okkara samfelag. Ein væl fyrireikað lóg gevur fólki eitt betri lív, ein illa tað øvugta.

**Serfrøðingur**
Tí sóknast vit eftir einum royndum løgfrøðingi, at byrja hjá okkum skjótast til ber. Um tú lýkur treytirnar, er møguleiki fyri at verða settur sum *serfrøðingur* sambært sáttmálanum millum BLF og Fíggjarmálaráðið. Ein treyt er minst 3 ára starvsroyndir í viðkomandi starvi ella samsvarandi eftirútbúgving. Sum lógarkønur serfrøðingur í Almanna- og heilsumálaráðnum fært tú ábyrgd fyri at ráðgeva leiðsluni og starvsfeløgunum í, hvussu lógarsmíðið í ráðnum skal mennast.

**Barnsburðaravloysari**
Harumframt leita vit eftir einum løgfrøðingi, ið kann starvast hjá okkum í einum barnsburðarfarloyvi í 6 mánaðir frá 1. august 2005 til 31. januar 2006. Tað er serliga lógarverkið á almannaøkinum, viðkomandi kemur at røkja.
Til hetta starvið eru ikki somu krøv til vitan á serfrøðingastøði, men ynskiligt er tó, at umsøkjarin hevur lokið prógv sum løgfrøðingur, tó er eisini møguleiki hjá umsøkjara, sum er um at vera liðugt útbúgvin at søkja.

Sum løgfrøðingur í Almanna- og heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir, at svara fyrispurningum frá Løgtinginum og at tulka lógir og reglur fyri Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir ráðnum.

**Vit ynskja okkum sostatt:** 2 løgfrøðingar, harav annar er royndur, serliga innan lógarsmíð. Harumframt at tit duga væl at samstarva og arbeiða sjálvstøðugt.
**Vit kunnu bjóða:** Størv sum eru sjálvstøðug, áhugaverd og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við starvsfelagarnar í ráðnum. Góðir møguleikar eru fyri framhaldandi førleikamenning.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskaparog løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt um Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

**Umsókn** við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálaráðið**
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 16. juni 2005 kl. 12.00. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, tlf. 30 40 50 ella teldupost: ahr@ahr.fo.

*Almanna- og heilsumálaráðið umsitur almannamál, heilsumál. javnstøðumál og bústaðarmál. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum. Uppgávan hjá Almanna- og heilsumálaráðnum er at ráðgeva landsstýrismanninum, at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur og at veita stovnum undir ráðnum ráð og vegleiðing. Sí meira á www.ahr.fo*



www. Sosialurin .fo

**Í dag eru fylgjandi feløg undir tvingsilsavtøku strikaði úr partafelagsskránni**

**Skrásetingarnr. Sp/f 3526,** Sp/f GLI Trading, 188 Hoyvík
**Skrásetingarnr. P/F 3143,** P/F Havhólm, 490 Strendur
**Skrásetingarnr. Sp/f 3456,** Sp/f Hjem- Is Føroya, 410 Kollafjørður
**Skrásetingarnr. Sp/f 3632,** Sp/f JN, 188 Hoyvík
**Skrásetingarnr. Sp/f 3205,** Sp/f Valdemar Lützen Rakstur, 100 Tórshavn
**Skrásetingarnr. P/F 3403,** P/F VFP Holding, 188 Hoyvík
**Skrásetingarnr. Sp/f 3315,** Sp/f Wenzel Bilaleiga, 100 Tórshavn

**Í dag eru fylgjandi feløg í likvidatión strikað úr partafelagsskránni**

**Skrásetingarnr. Sp/f 1662,** Sp/f D. Brockie Heilsøla, 100 Tórshavn
**Skrásetingarnr. Sp/f 2245,** Sp/f Heðin, 100 Tórshavn
**Skrásetingarnr. Sp/f 3509,** Sp/f Oddbjørg, 240 Skopun
**Skrásetingarnr. P/F 774,** P/F 16.12.2004, 700 Klaksvík
**Skrásetingar-nr. P/F 760,** P/F Heimafisk, 100 Tórshavn.

**Í dag eru fylgjandi feløg undir trotabúarviðgerð strikað úr partafelagsskránni**

**Skrásetingarnr. P/F 3600,** P/F Affinis, 350 Vestmanna
**Skrásetingarnr. Sp/f 3413,** Sp/f HG Transport, 100 Tórshavn
**Skrásetingarnr. Sp/f 2864,** Sp/f Urani, 438 Langasandur

Skráseting Føroya
31. mai 2005

Kristin Balle


Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Vit sóknast etir handverkara

At byrja beinanvegin. Skriva okkum nakrar reglur.

**Atlanticpane**

Tlf. 421405 · Fax 421602



Starvslýsingar




á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo



Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk